# Tobbi og Bill syrgdu fyri undir-haldinum

**Nýggjastu stjørnuskotini á føroyska tónleikahimmalinum, Bill Justinussen og Tórbjørn Jacobsen, spældu á sandinum í Syðrugøtu í kvøld, og brosivøddarnir fingu góða venjing**

**VÍKINGADAGAR**
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

**Eftir at Bill Justinussen og Tórbjørn Jacobsen framførdu ein andaligan sang í Kringvarpinum fyri nøkrum árum síðani, eru teir báðir blivnir ein nógv umbiðin duo.**

**Bill og Tobbi framførdu unplugged á tí lítla pallinum á sandinum, har teir umframt at skjóta eftir hvørjum øðrum politiskt spældu fleiri vælkend løg.**

**Bill helt speiskliga fyri, at tað fer at vísa seg komandi 10-12 mánaðirnar, um Tróndur í Gøtu er tjóðveldismaður. Hann vísti til, at mentamálaráðharrar hjá Tjóðveldi vanliga halda eitt lítið ár, áðrenn teir missa høvdið. Um Tróndur framvegis hevur høvdið intakt komandi summar, so var talan also ikki um ein tjóðveldismann. Tobbi svaraði aftur, at Miðflokkurin hevði stolið allar lands-stýrismenninar hjá Tjóðveldi og sipaði til Karsten Hansen, sum nú hevði fingið eyknevni Suffía mostir.**

**Repertoirið spenti víða við íslendskum, enskum, grønlendskum og føroyskum sangum. Tórbjørn Jacobsen framførdi ein grønlendskan barnasang, sum nevnist Anana, ið merkir mamma á grønlendskum. Hendan sangin hevur Tobbi lært frá sínum fyrrverandi starvsfelaga á Christiansborg, Lars-Emil Johansen. Tórbjørn framførdi hendan sangin so hjartaliga, meðan Bill spældi á bongotrummur, at man kundi trúð, at Tobbi hevði fingið hann inn við móðurmjólkini. Tað elvdi til fleiri látursýl, tá ið tilfeingismálaráðharrin heitti á fjøldina um at syngja við, og hann rundaði enntá av við at spæla tann vælumtókta grønlendska barnasangin sum eykanummar eftir kravi frá einum meiriluta av áhoyrarunum.**

**Harumframt spældu teir ein vælkendan sang hjá íslendska trubadurinum, Bubba Mortens, eins og onkur rock n´roll klassikari eisini slapp uppí part.**

**Av føroyskum tilfari spældu teir millum annað "Far lítli útum" eftir Finnboga Ísakson, og endabrakið var sangurin "Eitt ævigt ríkidømi", sum Petur W. Háberg hevur umsett úr norskum. Hetta lagið framførdu teir báðir í Útvarpi Føroya fyri nøkrum árum síðani, og tað hevur síðani verið ynskt fleiri ferðir í Kvøðuljómunum og Lurtarunum og Vit.**



# Budam

*Bjørk Olsen*

Áskoðarir vildu hava meir, tá Budam fór av pallinum leygarkvøldið. Budam átti bestu framførsluna higartil. Budam og viðsangarin, Ása Wraae, rokkaðu senuna við fjølbroyttum tónum, og kropparnir vóru ikki í somu støðu einaferð á pallinum.

Intenst, vakurt violinspæl frá Heiðruni Petersen fekk mannfólkini at ýla, meðan sexutta framførslan hjá Búa Dam óivað hevur fingið nógvar kvinnukroppar at leingjast.

Áskoðararnir vóru við frá byrjan. Fjøldin klappaði, sang og dansaði, og stemningurin var á hægsta støði gjøgnum alla konsertina. Budam hevði samband við fjøldina, og hetta gjørdi, at framførslan varð besta framførslan higartil á G! MINI.

Framførslan var fjølbroytt við violinspæli, klappispølum, lekrum røddum og kropsrørslum, meðan áskoðararnir vóru ein partur av stóra upplivilsinum. Tað var eitt fantastiskt show.

# ORCA

*Petur Háberg*

Framførslan hjá ORCA í leygarkvøldið var bæði forkunnug og spennandi. So nógv undarlig ljóð, ið ljóða so feitt saman.

Í gjárkvøldið var fyrstu ferð eg hoyrdi ORCA. Øll ummælini, eg havi lisið, hava tó verið full av jaligum lýsingarorðum, og tískil vóru vónirnar høgar. Men samstundis lá ivin og lúrdi. Er hetta bara hype? Ljóðførini eru forkunnug og annarleiðis, men er talan um tónlistarliga dygd?

Nú havi eg so verið og lurtað, og hetta ummælið fer beint í bunkan av áðurnevndu, jaligu ummælunum.

Tónleikurin hjá Jens Thomsen og hinum seks monnunum, ið mynda bólkin, svingaði nakað so vemmiliga væl. Ópoleraða og villa røddin hjá Kára Sverrissyni hóskar væl til urkendu rútmurnar.

Í mun til fyrradagin, so var ljóðið sera gott í gjár. So at siga øll ljóðførini komu til sín rætt og vóru á røttum staði í ljóðmynd-ini.

Helvtina av tíðini stóð ein og royndi at finna út av, hvar tey ymsu ljóðini komu frá. Er hatta tann ein-streingjaði steelgittarin hjá Boga á Lakjuni? Ella er tað kusturin hjá Jón Tyril? Ella fløskuorgulið hjá Ólavi Jákups-syni? At enda gav eg bara upp at greina tónleikin, og lat hann heldur vera tað, sum hann var; genialan. So nógv undarlig ljóð, ið ljóða so feitt saman.

Besta framførslan á ársins G! MINI, eftir mínum tykki.





# Eivør Pálsdóttir

*Jonhard Hammer*

Tað kann væl vera at, Tróndur var høvdingi í Norðragøtu. Men drotningin í Syðrugøtu eitur Eivør Pálsdóttir

Øll vikan hevur snúð seg um Trónd í Gøtu. Hvar hann hevur livað, og hvussu hann hevur livað. Semja varð um, at hann hevur livað sum høvdingur í Norðragøtu, og har er nú eisini standmynd reist av honum.

Sunnunáttina fingu vit staðfest, at sangdrotningin er úr Syðrugøtu, og tað slerdi hon fast, tá hon fór á pall nakrar hundrað metrar frá barndómsheiminum.

Einki er at ivast í, at næsta standmyndin, sum verður gjørd í Gøtum, verður av Eivør. Tá Eivør fór á pall var klokkan nærum tvey leygarkvøldið, og nógv fólk vóru møtt upp á Spæliplássinum. Eivør rúnarbant fólkið og gav teimum eitt fantastiskt upplivilsi við sínum sangum.

Hon megnaði at verma alla fjøldina við síni fantastisku rødd og útstráling, og kanska hevur hon ongantíð verið betur uppløgd á palli, enn hon var á heimavøllinum leygarkvøldið.

Hetta var eitt sera virðiligt punktum fyri G! MINI, og tað er púra vist, at G!, saman við Eivør, framhaldandi livir víðari. Tí slíkar upplivingar kunnu vit ikki vera fyriuttan.